AVTALA MILLUM

BÚSKAPAR- OG LØGFRØÐINGAFELAG FØROYA

OG

KOMMUNALA ARBEIÐSGEVARAFELAGIÐ

**§ 1**

Partarnir eru samdir um, at teir persónar, sum koma undir sáttmálaøkið hjá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, og sum starvast á tí kommunala sáttmálaøkinum, fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**§ 2**

Henda avtala kann uppsigast við í mesta lagi 3 mánaðar freist, roknað frá endanum av tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmálaskeiði millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Verður henda avtala uppsøgd, fer hon úr gildi samstundis, sum táverandi sáttmálaskeið millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya endar.

**§ 3**

Avtalan verður undirskrivað í tveimum eintøkum, og fær hvør partur sítt eintak.

Tórshavn, 10. november 2015

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið